## Í Skáa 6. januar 2005

# Tá Tjaldrið bjargaði Star Firth.

Vaktarskipið Tjaldrið var komið til landið í juli mánað 1976 og var farið í regluliga sigling 1. septembur sama ár, og var hetta á øðrum sinni at Tjaldrið bjargaði mannleysum skipi.

John Kjærbo eystan Á

Týsdag tann 4/1 – 77 klokkan 20:40 meðan Tjaldrið liggur á Havnini hoyrir vakthavandi á Tjaldrinum at Star Firth sendur út neyðarkall og biður um hjálp beinan vegin. Skipið hevur fingið leka á pos. 61° 30′ N 03°56′ V, sum er 80 sjómíl eystan fyri Føroyar. Klokkan 21:30 boðar Tjaldrið Marinustøðini frá (hereftir FRK) at Tjaldrið er á veg. Sagt verður frá FRK at hjálp frá Tjaldrinum er óneyðug, tá ið vaktarskipið Fylla er á veg út av Søldarfirði til Star Firth.

Hósdag 6/1 klokkan 12:50 koma boð frá FRK um at avloysa Fyllu á pos. 61,05°N og 06,24°V og yvirtaka bjargingina av Star Firth. Siglt verður ímóti uppgivnari pos. Klokkan 22:10 er Tjaldrið komið upp á síðuna av Fyllu og Star Firth 44,5 sjómíl suður úr Akrabergi og fer Fylla at sigla ímóti landi við manningini á Star Firth. Tjaldrið yvirtekur nú bjargingarroyndina. Star Firth hevur siglt við 3.6 knob síðan manningin fór av skipinum klokkan 20:00 kvøldið fyri. Tjaldrið fylgir síðani Star Firth, sum siglir í ein útsynning. Veðrið er sjaskut og ikki er hugsingur um at seta bát út fyri at koma umborð á Star Firth. Alla náttina og allan fyrrapartin fylgjast Tjaldrið og Star Firth. Kósin er í ein útsynning og ferðin er umleið 3,5 til 4 knob.

Fríggjadagin 7/1 klokkan 12:50, tá skipini eru 96 sm í ein útsýnning úr Akrabergi, verður mett at veðrið er so mikið batnað at møguleiki er at seta bátin út, og fer báturin av Tjaldrinum yvir á Star Firth. 1. stýrimaður, Jógvan Páll Lydersen, sáli, fer beina leið í stýrhúsið og koblar motorin úr. Avrátt var frammanundan um ikki at fara niðurundir, tí skipið hevði stóra slagsíðu á stýriborð. Øll stýriborðslúnningin var brotin vekk, so sjógvur var komin niður í tangarnir ígjøgnum peili- og luftrør. Sleipið verður sett fast á hekkuna av tí at møguleiki var ikki at koma fram á bakkan. Sostatt verður Star Firth sleipaður eftir reyv. 12:45 gummibáturin aftur á borðið hjá Tjaldrinum. Klokkan 14:00 byrjað verður at sleipa móti Føroyum og eru tað 96 fjórðingar í Akraberg. Klokkan 18:00 verður lorað 100 favnar meira av sleipiweiranum og koyrt verður meira á motorarnir, so ferðin

kemur upp á 4 knob. Klokkan 01:55 ljósmotorurin á Star Firth, møgiliga motorurin eisisni, gongur út. Neyðljósið á bátadekki lýsir tó.  Positiónin er tá Akraberg í rv 004° - 30 sm.

Leygardagin 8/1 klokkan 06:00, tá 18 sjómíl eru eftir í Akraberg, vísir tað seg at Star Firth fær meira slagsíðu og menn eru bangnir fyri at hann skal koppa. Men tað rættar seg aftur. Klokkan 12:00 tekur Tjaldrið Star Firth upp á stýriborðssíðu, og binda teir skipini saman og koma inn á Lopransfjørð. 12:30 fáa teir ein enda av Star Firth inn á Lopranskei, og roynir Tjaldrið at fáa Star Firth inn ímóti keiini. Forendin á Star Firth sleppur ikki at, tí ov grunt er, og verður Star Firth sostatt standandi á botni einar 2-3 metrar úr keiini. Øll stýriborðssíðan, sum vendur ímóti keiini liggur undir í sjógvi og sjógvurin liggur inn á hálvar lastalúkunar. Slagsíðan er 30-40° á stýriborð.

Beinanvegin verður farið undir at fáa pumpur til vega og fáa tær umborð á Star Firth fyri at lensa úr maskinrúminum og lastini. Klokkan 15:30 fara tveir froskmenn – Jógvan Páll Lydersen og John Kjærbo eystan Á - niður at seta slangur á peilirørini, og vórðu aðrar slangur settar á luftrørini, so tað var møguleiki fyri at pumpa úr botntangunum. Tað vísti seg at rigga nøkulunda. Samstundis varð skipið táttað nærri keiini. Um kvøldið varð avrátt at fáa sandbátin Árnanes at koma suður at grabba úr lastini. Farmurin var vulkanøska úr Íslandi til Noregs.

Sunnudagin 9/1 kl 06:00 kemur Árnanes suður á Lopra. Hann skal grabba farmin úr lastini á St Firth. Bíðað verður eftir fjørðu, sum er klokkan 15:00. Kl 07:00 til 09:10 sleipa Star Firth umleið 10 metur inneftir móti keiini. Kl 10:00 til 12:00 fylla barlasttangarnir no. 3-4 BB á Star Firth, fyri at rætta skipið upp. Kl 12:30 tveir froskmenn fara niður á St Firth arbeiða við at fáa slangur á stýriborðstank no. 1 á Star Firth. Kl 12:40 veðrið øtlar til vindmegi 9 (21-24 m. sek.) av landnyrðingi-eystri. Árnanes, sum var komin um morgunin, fekk onki gjørt henda dagin. Klokkan 14:00 til 15:00 seta fleiri endar inn frá Star Firth aftan og framman. Samstundis verður Tjaldrið bundið væl at bryggjuni. Allan seinnapartin og langt út á náttina er vindurin 8-9 vindstig (17-24 m. sek.) av landnyrðingi-eystri, við grovum kavaroki.

Mánadag 10/1 klokkan 09:00. Veðrið er landnyrðingur-eystan, vindstyrki 8 (17-21 m. sek.). Arbeiðið verður tó tikið upp aftur. Klokkan 12:00 byrja at lensa stýriborð botntanga nummar 1. Sjógvur rennur frá Center-tangum 2, 3 og 4 aftur í maskinrúmið, og verður síðan pumpaður úr maskinrúminum. Klokkan 13:30 tveir froskmenn niðri og seta slangur til peili- og luftrør til botntangar, sum síðan blivu lensaðir. Samstundis verður ein leki í forpeak tanganum tættir. So verður tann stóra lensipumpan sett til sama tanga sum verður tømdur. Klokkan 19:00 allir tangar í stýriborð tómir, uttan nummar 3. Klokkan 19:00 Lúkukarmarnir á 1 og 2  eru fríir úr sjónum. Kl

19:15 Árnanes leggur at bakborðssíðu á Start Firth. Byrjað verður at taka lúkurnar av last no. 1. Kl 19:30 byrjað verður at grabba úr last nummar 1. Klokkan 21:30 taka lúkurnar av last nummar 2. Kl 22:00 skifta yvir at grabba úr last nummar 2. Kl 23:15 er Árnanes liðugur at grabba. Tilsamans vórðu umleið 100 tons tikin úr Star Firth. 23:30 til 01:30 skalka lastalúkur á 1 og 2.

Týsdagin 11/1 klokkan 10:00. Veðrið er nú norðan vindstyrki 5 (8-11 m. sek.) og skýggjað. Hitin liggur um frostmarkið. Hitin hevur ligið um frostmarkið hesar dagarnar Tjaldrið hevur ligið á Lopra. Klokkan 13:00 gera sleipitrossan fastan á Star firth og seta lensipumpur nummar 1 og 2 umborð, pluss fimm slangur. Klokkan 16:00 alt er klárt til at byrja at sleipa. Sleipið verður avlýst vegna veður. Skipini verða liggjandi við bryggju í Lopra til dagin eftir.

Mikudagin 12/1 klokkan 08:15 fer Tjaldrið við Star Firth av Lopra við kós ímóti Tórshavn. Veðrið er nú landnyrðingur-eystan vindstyrki 4 (5-8 m. sek.), minkandi til vindstyrki 2 (2-4 m. sek.). Klokkan 12:00 binda Star Firth upp á bakborð á Tjaldrinum uttanfyri Tórshavn. Kl. 13:00 Star Firth bundin til kei í Tórshavn. Sleip liðugt.

Hendan uppgávan strekti seg frá 4/1 til 12/1 frá tí Star Firth sendi út neyðarkall og til hann lá bundin við kei í Tórshavn.
Manningin á Tjaldrinum henda túrin var:
Skipari: Eyðbjørn Lervig
Yvirstm.: Andrias C. Samuelsen
Fyrsti stýrimaður: Jógvan Páll Lydersen kavari.
Maskinstjóri: Sofus Johansen
Fyrsti meistari: Jógvan Hammer
Kokkur: Harry Jacobsen
Bátsmaður: Páll Poulsen
Dekkari: John Kjærbo eystan Á.kavari
Dekkari: Eyvind Bech

Tórshavn 16-12-05
John Kjærbo eystan Á